# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## AB aftur í odda-braki

**Hesa ferð skulu argjamenn á vitjan í Vági, har VB/Sumba bert hevur hálviksað eina ferð í ár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Oddastríðið í næst bestu mansdeildini hevur alt kappingarárið staðið millum VB/Sumba, AB og 07 Vestur, og enn er munurin teirra millum sera lítil.

Hesa ferð er odda-dystur í Vági, har AB kemur á vitjan. Fyrr í ár vann VB/Sumba upp-gerðina við einum máli móti ongum, og yvir høvur hava mótstøðu-liðini havt tað sera trupult vesturi á Eiði-num, har bert HB við einum málleysum javnleiki hevur fingið nakað burturúr.

Tí skal VB/Sumba kanska roknast sum lítil favorittur undan dystinum, sum væl kann gera av, hvat av liðunum skal spæla Formula-bólt komandi kappingarár. Og ikki minst kann dysturin skapa eitt gott útgangs-støði fyri VB/Sumba, sum eisini eigur enn eina vitjan frá 07 Vestri til góðar.

07 Vestur er stórfavo-rittur, tá teir á heimavølli taka ímóti EB/Streymi, og tí verður vágaliðið eftir øllum at døma aftur á uppflytaraplássi, tá vikuskiftið er av.

Í botninum kunnu NSÍ ella B68 veruliga skræða seg frá niður-flytingarvanda, tá tey hittast í Runavík.

Skála-B68:

## Skála má gera ein Skála

**Einki annað enn sigrar kunnu brúkast, nú Skála skal bjarga sær upp um niðurflytingar-strikuna**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Skála hevur verið í tungum sjógvi í alt ár. Ein sigur er tvingandi neyðugur sunnudagin, um bjargingin enn skal hómast*

Trý stig eru upp til næstu liðini, og annað av hesum fær heilt víst stig um vikuskiftið.

Tey bæði fyrstu árini, sum Skála var í bestu føroysku deildini, megnaði liðið á mest sum ótrúligan hátt at vinna seg upp um niðurflytingarstrikuna seinastu umførini. Í báðum førum við trimum sigrum á rað.

Og sum fortreytirnar eru í dag, noyðist Skála skjótt aftur at gera ein Skála. Og byrjar hesin ikki nú, verður mest sum vónleyst at lyfta seg tvey pláss upp á stigatalvuni, har KÍ og B71 eru liðini, sum vinnast skal á.

Hesa ferð er mótstøðuliðið B68, sum hevur verið sera væl koyrandi síðani summarsteðgin. Hinvegin kann hugsast, at toftamenn ikki eru heilt so topptunaðir, sum teir hava verið seinastu vikurnar, nú teir mest sum við vissu hava rokkið málinum um halda sessinum í deildini.

Tað hevur Skála so langt ífrá, men tað telur rætta vegin, at teir hava allar mans tøkar til dystin.

Tað hevur B68 eisini. Eisini Jóhan Símun Edmundsson, sum fyrst keikti sær fótin og síðani breyt sær nøsina. Hartil hevur Bill McLoud Jacobsen eisini møguleika at hjava senegalesiska Landing við í hópinum. Hesin hevur als ikki spælt í landskappingini, tí hann varð álvarsliga skaddur longu í venjingardysti undan kappingarbyrjan.

NSÍ-B36:

## Silvurdystur við Løkin



**Runavíkingar kunnu lyfta seg upp aftur á silvurplássið, men tað krevur trý stig, tá eitt skert B36-lið kemur á vitjan við Løkin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í fjør var talan um gullbrak, tá B36 vitjaði við Løkin. Í so máta verður talan neyvan um nakra endurtøku, nú munurin upp til oddin er somikið stórur. Men ein dystur um silvurið er heldur ikki at forkastað, og tað er alt, sum bendir á, at so verður.

Trýstið er serliga á NSÍ í so máta, og har eru allir mans tøkir til uppgávuna. Einasta ivamáli er Einar Hansen, sum spakuliga er við at koma fyri seg, eftir at hann varð skaddur fyri nøkrum vikum síðani.

Hinvegin er verri statt hjá B36. Eins og hjá Víkingi, so bíða tey í B36 eftir, hvørja støðu Aganevndin í dag fráboðar um eitt møguligt leikbann til Herbert í Lon Jacobsen. Hartil er Jákup á Borg leikbannaður, eftir at hann móti KÍ fekk sítt fimta gula kort í ár, og á skaðalistanum eru Bergur Midjord og Ingi Højsted, og roknað verður ikki við, at nakar teirra er tøkur sunnudagin.

Tí bendir alt á ein dyst, har B36 verður varið í útgangsstøðinum, meðan tað verður uppgávan hjá NSÍ at skapa dystin.

*B36 vann seg seinasta vikuskiftið fram um NSÍ og upp á silvurplássið. Setningurin nú er at halda fast um hesa støðu*